# Hetta er ikki bara ein lýsing. Hetta er ein upplýsing

**Okkara lýsingaráðgevi sigur, at fólk tíma ikki at lesa lýsingar við nógvum teksti. Tað trúgva vit ikki uppá. So vit fara at siga tær eitt sindur um okkum, okkara vørur og um framleiðslu av reingerðarevnum sum heild.**

---

- allar húsarhaldssápur okkara verða framleiddar í Føroyum samsvarandi **donskum og ES-lógum/reglugerðum á økinum, og við serligum atliti til føroyska umhvørvið**.

- av tí, at føroyska vatnið er kálkfrítt - tað kemur úr erva sum regn, og ikki úr jørðini, **nýta vit ikki evni til at bróta niður kálk við í húsarhalds-vørum okkara**, og tað er náttúran fegin um. Jú færri kemisk evni, vit lata út í umhvørvið, jú betri, halda vit - og náttúran.

- vit hava **egna starvsstovu/laboratorium**, sum í neyvum samstarvi við altjóða serkunnleika hevur dagliga eftirlitið við menning og framleiðslu.

- vit leggja alstóran dent á at nýta **lætt niðurbrótilig, natúrlig evni úr plantuoljum** í okkara húsarhaldssápum.

- **eingin** av okkara húsarhaldsssápum innihalda evni, sum standa á listanum hjá ES yvir allergielvandi evni, sokallaða allergilistanum.

- litevnini, vit nýta, eru tey somu, sum eru **góðkend til nýtslu innan matvøruframleiðslu.**

- Kemilux framleiðir samsvarandi altjóða **ISO 9001:2000 góðskuskipanini**.

- strongu krøvini, sum vit seta okkum sjálvum, hava millum annað havt við sær, at Kemilux er **góðkendur veitari til sera kravmiklu oljuvinnuna**.

- tá tú keypir okkara húsarhaldssápur, keypir tú altíð grønt. **Allar húsarhaldssápur okkara**, sum tú sært á handilshillunum, lúka treytirnar fyri **grønu merkingini**, sum danska Sundhedsstyrelsen viðmælir.













KEMILUX framleiðir samsvarandi ISO 9001:2000 skipanini

KEMILUX er góðkendur veitari til oljuvinnuna

*- tín trygd fyri, at vøran er í lagi*

**KEMILUX**

tlf. 350830 - www.kemilux.fo